Nordisk Ministerråd

# NORÐURLENDSK SAMSTARVSÆTLAN FYRI UMHVØRVI OG VEÐURLAG 2019-2024

NA2018:913

Hetta er ein umseting av ANP2018:806 Nordiskt samarbetsprogram för miljö och klimat 2019-2024, http://dx.doi.org/10.6027/ANP2018-806.

Nordisk Ministerråd – Ved Stranden 18 – 1061 København K – www.norden.org

# Innihald


Formæli ..... 2

1. Stevnumið fyri norðulendska umhvørvis- og veðurlagssamstarvið ..... 4
   Norðurlond fara at: ..... 4
2. Ringbúskapur ..... 8
   Mið 8
   2.1 Burðardygg nýtsla og framleiðsla ..... 9
   2.2 Tilfeingiseffektivar og eiturfríar ringrásir ..... 10
   2.3 Burðardyggir býir ..... 11
   2.4 At slóða fyri grønari umlegging í Norðurlondum ..... 11
3. Veðurlag og luft ..... 13
   Mið 13
   3.1 Paríssáttmálin og altjóða veðurlagsarbeiðið ..... 14
   3.2 Fígging ..... 16
   3.3 Rammuverk og stýriamboð til at skerja útlát ..... 16
   3.4 Veðurlagstillaging ..... 17
   3.5 Luftdálking ..... 18
4. Evnindir – umhvørvi og heilsa ..... 20
   Mið 20
   4.1 Eginleikar og vandar við evnunum ..... 21
   4.2 Heimsfevnt evnindaarbeiði ..... 23
5. Lívfrøðiligt margfeldi ..... 24
   Mið 24
   5.1 At gagnnýta vistskipanartænastur burðardygt ..... 25
   5.2 At verja náttúruna og varðveita hennara margfeldi ..... 26
   5.3 Veðurlag og lívfrøðiligt margfeldi ..... 27
6. Hav og strendur ..... 29
   Mið 29
   6.1 Havið og havtilfeingið ..... 30
   6.2 Dálkandi útlát og rusk í havinum og fram við strondunum ..... 30
   6.3 Vistskipanargrundað havfyrisiting og vernd av havøkjum ..... 31
   6.4 Hav og veðurlag ..... 32
7. Fremjing ..... 33

Óheft samstarvsátøk (faktaboks við leinkjum) ..... 36

Styttingar og hugtøk: ..... 37

# Formæli

Tað er við gleði, at eg skrivi formælið til hesa nýggju samstarvsætlanina, sum skal stýra og leiðbeina okkara norðurlendska samstarv hetta til 2014. Vit liva í eini tíð við skjótum broytingum og stórum mótsetningum. Øðrumegin síggja vit alt størri altjóða undirtøku fyri at fremja Agenda 2030, Paríssáttmálan og aðrar týðandi altjóða sáttmálar á umhvørvisøkinum. Vit síggja eisini, hvussu vinnulívið og aðrir partar eru alt meira sinnað at taka tøk til frama fyri grøna umlegging. Hinumegin síggja vit vaksandi mótsetningar millum lond og vantandi vilja hjá summum at leiða og fremja neyðugar atgerðir. Samstundis gerast avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum og tí skjótt minkandi lívfrøðiliga margfeldinum alt sjónligari.

Norðurlond hava leingi víst, at tætt umhvørvis- og veðurlagssamstarv munar, bæði á politiskum stigi og á serfrøðistigi. Undir undanfarnu samstarvsætlan hava vit saman strongt á at koma undir land við Paríssáttmálanum. Í sambandi við UNECE-ráðstevnuna *Environment for Europe* í Batumi í juni 2016 komu Norðurlond við eini felags fráboðan og tilsøgn innan fyri *Batumi Action for Clean Air*. Londini komu eisini við eini felags fráboðan á partafundinum undir Ramsar-sáttmálanum í 2015 um týdningin av at varða um leiklutin, sum vátlendir hava fyri veðurlagið og tað lívfrøðiliga margfeldið.

Við eini norðurlendskari plastætlan í 2017-18 gjørdu vit tíðliga vart við trupulleikan av plasti. Vit hava givið okkara íkast til ES-arbeiðið við eini ætlan fyri eiturfríum umhvørvi, millum annað við at leggja eitt tilmæli fyri kommissiónina við støði í okkara norðurlendsku virkisætlan fyri haldgóðum klædnatilfari. Hetta ávirkanararbeiðið hevur verið eitt íkast til avgerðina í ES um at forbjóða ávísum serliga vandamiklum evnum í klædnatilfari. Verkætlanin *Green to Scale*, sum vísir á møguleikar at skerja útlátið av vakstrarhúsgassi við norðurlendskum grønum loysnum, hevur vakt altjóða ans eins og arbeiðið at stuðla stigvísari avtøku av studningsveitingum til lívrunnin brennievnir.

Árini 2017-18 stóð fyrrverandi norski veðurlags- og umhvørvisráðharrin, Tina Sundhoft, á odda fyri eini verkætlan at lýsa norðurlendska umhvørvis- og veðurlagssamstarvið. Hon hevur sett fram 12 tilmælir, sum vit mugu greina nærri, sum vit fremja hesa nýggju ætlanina.

Veðurlagið telist millum tær størstu avbjóðingarnar hjá mannaættini. Norðurlond hava leingi víst á, at til ber at sameina dyggan veðurlagspolitikk við varðveitta vælferð og kappingarføri. Tørvur er framvegis á at bera henda boðskapin fram. Øll Norðulond hava nú veðurlagslógir, og fleiri hava veðurlagspolitisk rammuverk við langtíðarmálum. Vit síggja tí ein vaksandi tørv á at luta royndir landanna millum tey komandi árini. Saman fara vit eisini at gera okkara til, at Paríssáttmálin verður framdur miðvíst, og vit fara at

ganga undan. Undir tí svenska formansskapinum í 2018 varð skipað fyri fundi á høgum stigi við vinnulívið. Fyritøkur heilsa høgum málum og langskygdum felagsreglum, sum skunda undir umleggingina, vælkomnum. Tær vildu hava Norðurlond at halda fram og í uppaftur størri mun ganga á odda innanríkis, í ES og á altjóðastigi. Um ikki vit í Norðurlondum kunnu ganga undan og vísa, at tað ber til – hvør skal so gera tað?

Okkara búskapir byggja framvegis í alt ov stóran mun á skjóta rávørunýtslu. Tað 12. burðardygdarmálið í Agenda 2030 um burðardygga framleiðslu og nýtslu er ein avbjóðing. Ringbúskapur er tí eitt raðfest evni í hesi samstarvsætlanini. Vit leggja eisini meira fyri at steðga streyminum av plasti og mikroplasti, sum fer í havið og inn at strondunum, og at minka um skaðaárinið, sum plastið hevur á umhvørvið. Norðurlendska samstarvið skal eisini alsamt skunda undir, at okkara borgarar fáa eitt eiturfrítt umhvørvi, og umhvørvismerkið Svanurin skal vera eitt sterkt norðurlendskt vørumerki.

Okkara lond eru fyri skjótari býargerð, og burðardygg býarmenning fær alt størri týdning. Vit fara tí undir eitt nærri norðurlendskt umhvørvissamstarv um burðardyggar býir.

Vistskipanir á landi og sjógvi eru undir stórum trýsti, bæði í Norðurlondum og í restini av heiminum. Gongdin við alsamt minkandi lívfrøðiligum margfeldi má steðgast og vendast. Norðurlendska samstarvið gevur sítt virkna íkast til at steðga afturgongdini, millum annað í arbeiðinum undir sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi. Havráðstevnan hjá ST hevur varpað ljós á havumhvørvið, og norðurlendska samstarvið hevur ein týðandi leiklut í at mena ta vistskipanargrundaðu fyrisitingina av havinum. Avleiðingarnar av broyttum veðurlagi á lívfrøðiligt margfeldi og hav verða bornar týðiligari fram í samstarvinum.

Við hesi nýggju samstarvsætlanini halda vit fram at menna norðurlendska samstarvið og røddina hjá Norðurlondum í heiminum.

*Karolina Skog*
Umhvørvisráðharri í Svøríki

# 1. Stevnumið fyri norðulendska umhvørvis- og veðurlagssamstarvið

## Norðurlond fara at:

- samstarva um umhvørvis- og veðurlagspolitikk til at styðja upp undir burðardygga menning í Norðurlondum, í ES og á altjóðastigi
- samstarva í altjóða samráðingum og virkið at virka fyri, at altjóða umhvørvis- og veðurlagssáttmálar verða framdir miðvíst. Týðandi dentur skal leggjast á at fremja Paríssáttmálan miðvíst
- virka fyri, at størri tøk verða tikin at fremja heimsmálini fyri burðardygd í Agenda 2030
- virka fyri, at tað umhvørvis- og veðurlagspolitiska regluverkið í ES verður ment
- virka fyri at steðga gongdini við alsamt minkandi lívfrøðiligum margfeldi og fyri burðardyggari fyrisiting, sum tryggjar tey norðurlendsku náttúruvirðini
- virka fyri ringbúskapi og gera sítt til, at nýtsla og framleiðsla fara fram innan fyri karmarnar, sum náttúran setur
- virka fyri at avmarka váðan, sum evnafrøðilig evnir í vørum seta fólk og umhvørvi í, so nógv sum gjørligt
- virka fyri, at streymurin av plasti og mikroplasti, sum fer í havið, steðgar
- virka fyri, at Norðurlond framhaldandi verða eitt undangonguøki fyri nýskapandi loysnum, sum kunnu vera til bata fyri umhvørvið
- virka fyri at varða um og menna samvirkan við aðrar geirar og onnur evnisøkir

### *Norðurlendskur fyrimunur og meirvirði*

Norðurlond hava leingi samstarvað um umhvørvis- og veðurlagspolitikk, og nógv síggja londini sum fyrimyndir á økinum. Norðurlendskt samstarv heldur fram at mennast og leggur áherðslu á styðja upp undir ta grønu umleggingina av okkara samfeløgum. Átøkini skulu vera strategisk og miða eftir slíkum, sum kastar norðurlendskt meirvirði av sær. Norðurlendski fyrimunurin ber í sær, at londini ofta røkka einum betri úrsliti við at samstarva enn hvørt sær. Í norðurlendska samstarvinum er stutt frá uppskoti til verk. Talan kann vera um samstarv í altjóða arbeiðinum ella um at loysa serligar norðurlendskar avbjóðingar í felag, t.d. avleiðingarnar av veðurlagsbroytingum í Norðurlondum og at verja norðurlendsk náttúruvirðir og vistskipanir, sum veita okkara

samfeløgum týdningarmiklar vistskipanartænastur. Samstarvið virkar sum stuðul og ískoyti til politikkmenning innanlands, í ES og á altjóðastigi. Arbeiðið skal vera langskygt framsøkið og samstundis hava fyrilit fyri tí, sum áður er framt í norðurlendska samstarvinum. Sjónarhornið hjá børnum og ungum og javnstøða eru týdningarmikil í norðurlendska umhvørvis- og veðurlagssamstarvinum. Norðurlond skulu halda fram at fremja nýskapandi og víðfevndar loysnir, sum kunnu fremjast í verki, og sum kunnu avmarka skaðiliga umhvørvis- og veðurlagsávirkan so nógv sum gjørligt. Felags norðurlendsk átøk at fremja burðardyggar loysnir kunnu gera støðuna hjá Norðurlondum sterkari og gera londini sjónligari.

Norðurlendsk umhvørvismerking við Svaninum skal framhaldandi fremja burðardygga nýtslu og framleiðslu. Tað er umráðandi at skoða umhvørvisárinini úr einum lívsringrásarsjónarhorni og eftir allari virðisketuni. Norðurlendska samstarvið skal seta yvirskipað og tvørgangandi evnir á breddan innan fyri fleiri málsøkir og tvørtur um geiramørk. Tá ið eitt øki, sum røkkur tvørtur um geirar, verður skoðað undir einum, fæst ein betri mynd av heildini. Hetta geldur ikki minst fyri orku og flutning, burðardygga býarmenning og skógrøkt og landbúnað. Undir undanfarnu samstarvsætlan vórðu stig tikin til serligt samstarv um plast og klædnatilfar. Undir hesi samstarvsætlanini eiga slík framtøk á politiskt raðfestum økjum at verða umhugsað.

Øll norðurlendsk náttúrusløg og samfeløg verða viðgjørd í norðurlendska samstarvinum. Tað er eitt nú týdningarmikið at samstarva um tilfeingisfyrisiting og at luta royndir landanna millum, tá ið ræður um norðurlendsk smásamfeløg.

### *Virkið altjóða arbeiði og felagsskapur*

Altjóða arbeiðið at skunda undir burðardygga menning er á íverksetanarstigi. Agenda 2030 leggur við sínum burðardygdarmálum lunnar undir møguleikar fyri einum heildararbeiði fyri burðardyggari menning, har ið Norðurland framhaldandi skulu vera virkin. Umhvørvi og veðurlag hava stóran týdning fyri málini. Týdningurin av samstarvi tvørtur um landamørk verður eisini alt meira sjónligur og avgerandi. Heimsmálini um burðardygga nýtslu og framleiðslu (SDG12), veðurlag (SDG13), hav (SDG14) og lívfrøðiligt margfeldi (SDG15) eru serligar avbjóðingar úr einum norðurlendskum sjónarhorni.

Norðurlond skulu í felag halda fram at streingja á í altjóða samráðingum, millum annað við at betra vitanargrundarlagið og taka upp nýggj evnir. Tá ið ræður um mál viðvíkjandi luft, evnindum og ruski, veðurlagi og havi, hava norðurlendsk felagsátøk slóðað fyri altjóða semjum, sum hava betri umhvørvi við sær – á altjóðastigi og fyri íbúgvarnar í Norðurlondum. Framsøkin fremjing og menning av stórum altjóða avtalum skal raðfestast hetta skeiðið. Serliga týdningarmikil mót, har ið Norðurlond saman kunnu gera mun, eru í ST-skipanini, í ES og í OECD. Norðurlond skulu eisini gera sítt til at slóða fyri fremjing í øðrum londum, til dømis við at luta sínar royndir og vitan við onnur.

Tær skjótu umhvørvis- og veðurlagsbroytingarnar í Arktis eru ein altjóða vekjaraklokka. Norðulendska samstarvið skal gera sítt til at framleiða dygga vitan um fyrst av øllum virknaðin av veðurlagsbroytingunum og avleiðingarnar av dálkingini í Arktis. Henda vitanin skal so leggja lunnar undir væl grundaðar politiskar avgerðir. Tað er eisini týdningarmikið at styðja umhvørvisarbeiðið í Barentsøkinum. Tað er umráðandi at varðveita samvirkan millum ymsar politiskar stovnar í norðurøkinum.

Við virknum altjóða umhvørvisarbeiði hava Norðurlond í nógv ár savnað sær víðfevndar royndir á økinum. Samrøða og samstarv við onnur lond eru grundleggjandi fyri at skilja støðuna hjá øðrum og vaksa um vitanina um serlig mál.

### *Dyggari umhvørvis- og veðurlagspolitikkur í ES/EBS*

Virksemið hjá Norðurlondum í ES/EBS hevur skundað undir meira miðvísa umhvørvislóggávu, eitt nú tá ið ræður um evnindir. Norðurlond skulu halda fram at samstarva fyri at menna umhvørvis- og veðurlagspolitikkin hjá ES.

Norðurlendskt samstarv um at fremja ES-reglur og -ætlanir gagnar tillagingini til norðulendsk viðurskiftir og hevur í nógvum førum munadyggari tilfeingisnýtslu og størri framskygni við sær.

Norðurlond skulu ganga undan at fremja ta sjeyndu umhvørvisvirkisætlanina hjá ES og virkið virka fyri, at tann áttanda ætlanin fer at bera í sær dyggari umhvørvispolitikk í ES.

### *Økt vitan og førleiki*

Norðurlond skulu eisini í felag virka fyri at byggja upp og luta við onnur sína vitan á økjum, har ið tað ræður um at eyðmerkja nýggjar avbjóðingar ella finna góð háttaløg fyri at gera felags umhvørvismið til veruleika og styðja upp undir vitanargrundaða fyrisiting. Vitan og førleiki eru ein fyritreyt, skulu einstaklingar, felagsskapir og fyritøkur kunna geva sítt íkast til at leggja samfelagið um.

Norðurlendskt samstarv skal eisini gera sítt til at lætta um hjá fyritøkum, kommunum, felagsskapum og einstaklingum í sambandi við týdningarmiklar avgerðir í gerandisdegnum, sum hava stóran týdning fyri veðurlagið og umhvørvið. Skal ein grøn umlegging av teimum norðurlendsku samfeløgunum vera møgulig, mugu vinnulívið, vísindaumhvørvið og tað borgarliga samfelagið á stað-, økis- og landsstigi sýna henni áhuga og geva sítt íkast.

Umhvørvis- og veðurlagsøkið er í støðugari menning við nýggjum spurningum, avbjóðingum og loysnum. Framleiðslan av nýggjari vitan og nýskapan er avgerandi fyri framtíðina. Tað geldur fyri tøkni og náttúruvísindir, men eisini samfelagsfrøði og hugvísindir umframt tvørgangandi mál. Okkum tørvar økta vitan um, hvussu atgerðir at

betra um umhvørvið ávirka ymsar einstaklingar og bólkar. Børn eru serliga viðkvom, og tí er tað týdningarmikið, at dentur verður lagdur á at minka um ávirkanina á tey.

Okkum tørvar økta vitan um talgilding at lýsa møguleikar og vandar. Talgilding kann skapa nýggjar møguleikar fyri munadyggari tilfeingisnýtslu og fremja burðardygga nýtslu. Samstundis kunnu talgilding og býtisbúskapur elva til nýggjar nýtslu-, handils- og ferðavanar, sum kunnu hava bæði gagnliga og skaðiliga ávirkan á veðurlag og umhvørvi. Almenn átøk mugu leggjast soleiðis til rættis, at møguleikarnir, sum talgildingin ber í sær, verða gagnnýttir og vandarnir avmarkaðir mest møguligt.

# 2. Ringbúskapur

## Mið

- Norðurlendskt samstarv hevur gjørt sítt til, at munandi stig eru tikin at skapa ringrásir og gera tær eiturfríar og tilfeingiseffektivar
- Norðurlendskt samstarv hevur gjørt sítt til at minka um nýtsluna av avmarkaðum tilfeingi, minka um nøgdirnar av ruski og vaksa um nýtsluna av ruski sum tilfeingi
- Norðurlendskt samstarv um stýriamboð til grøna umlegging og ringbúskap er ment
- Norðurlendskt samstarv hevur gjørt sítt til, at plast í mestan mun er partur av einum ringbúskapi og ikki endar í umhvørvinum

Rávøru- og orkunýtslan í dag leggur trýst á tað avmarkaða tilfeingið á jørðini og hóttir fólk og umhvørvi. Tørvur er á einum ringbúskapi, har ið tað longu á ætlanarstigi verður miðað eftir at minka sum mest um tilfeingisnýtsluna. Samfelagsmenningin skal leggjast til rættis við tí fyri eyga at skapa ringrásir, at brúka varandi orku og endurnýggjandi rávørur og at fremja tilfeingiseffektivitet í øllum liðum. Vistsnið er eitt týðandi amboð. Vørur skulu virkast, so at til ber at endurnýta, endurvinna, umvæla og vera felags um tær. Rusk og orka skulu nýtast á munadyggari hátt. Ein grundleggjandi fyritreyt fyri tilfeingiseffektivum ringrásum er, at farið verður burtur frá serliga vandamiklum evnum.

Tað er umráðandi at greina, hvørja umhvørvis- og veðurlagsávirkan vørurnar hava eftir allari virðisketuni. Eisini umhvørvisávirkan í øðrum londum, sum stendst av okkara nýtslu, eigur at verða tikin við í hesum sambandi.

Norðurlond skulu gera sítt til, at tað eydnast at røkka málunum í Agenda 2030 og øðrum altjóða stevnumiðum um burðardygga nýtslu og framleiðslu. Londini skulu geva sítt virkna íkast til at stimbra ES-mannagongdir viðvíkjandi ringbúskapi og virka fyri øktari lutan við onnur lond, millum annað við at ganga undan við góðum fyridømi. Norðurlond skulu geva sítt virkna íkast, tá ið ræður um arbeiðið í ES fyri at minka um ta skaðiligu umhvørvisávirkanina av plasti.

## 2.1 Burðardygg nýtsla og framleiðsla

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at stimbra menningina av sniðum fyri at fremja langlívaðar, tilfeingissparandi, eiturfríar og endurnýtandi vørur
- at menna Svanin, so at hann saman við ES-blómuni betur kann slóða fyri gagnligari umhvørvisávirkan gjøgnum økt útboð og eftirspurning eftir umhvørvismerktum vørum og tænastum
- at virka fyri størri kunnleika um og víðkaðum samstarvi við og millum fyritøkur um nýggjar handilshættir og ta bestu tøknina til at røkka einum ringbúskapi

Brúkarar eru ein sterkur máttur til at minka um umhvørvisávirkan. Norðurlendska samstarvið gevur sítt íkast til menningina av burðardyggari nýtslu og burðardyggum lívsstíli. Norðurlendskt samstarv kann geva sítt íkast til øktan kunnleika um umhvørvisávirkanina í allari lívsringrásini og virka fyri betri samskifti um hesar spurningarnar millum keyparar og seljarar. Týdningarmkil økir at arbeiða við eru millum annað matvørur, flutningur og bústaðir. Arbeiðið eigur at geva nýtsluvanunum hjá ymsum bólkum gætur.

Norðurlendska umhvørvismerkið, Svanurin, eigur framhaldandi at verða ment saman við ES-blómuni. Alt fleiri vørur og tænastur eru góðkendar av Svaninum og nú eisini peningaumsiting. Hesin vøksturin eigur at halda fram. Veðurlagsávirkanin er ein týðandi táttur í at menna Svanin, sum eigur at verða styrktur. Svanurin kann gera sítt til, at ringbúskapurin verður stimbraður, til dømis við at menna treytir, við at gerast meira samskiftandi og við øktari talgilding.

Grønt alment innkeyp og íløgur eru týdningarmikil stýriamboð til at fremja nýskapandi vørur, skipanarloysnir og tænastur við stórum umhvørvisíkasti. Betraðar treytir og standardar eru týdningarmikil amboð til at røkka burðardyggari framleiðslu og nýtslu. Í framtíðini er tað somuleiðis týdningarmikið at geva ávirkanini og umhvørvisárinunum av almennum innkeypi gætur. Norðurlendskt samstarv eigur millum annað framhaldandi at arbeiða við støðugt at menna góð háttaløg og treytir og at luta sínar góðu royndir við grønum almennum innkeypi við onnur. Leikluturin hjá umhvørvismerking í sambandi við grønt alment innkeyp eigur somuleiðis at verða mentur.

Tænastur eru ein alt størri partur av búskapinum. Fyri at fleiri partar skulu kunna fáa gagn av fyrimununum av sínámillum lutan, umvæling, samogn og samskipan, má norðurlendska samstarvið útvega sær størri kunnleika um hesi fyribrigdini.

Við at breiða út vitan um nýggjar burðardyggar handilshættir og umhvørvisloysnir kunnu norðurlendskar fyritøkur sameina kappingarføri við umhvørvisfyrilit. Arbeiðið við

tí bestu tøku tøknini (BAT), sum serliga er ætlað smáum og miðalstórum fyritøkum, hevur stóran týdning.

Norðurlendskar fyritøkur eru í nógvum førum sera munadyggar, tá ið ræður um orku og aðrar rávørur, og standa fyri menningararbeiði við nýggjum burðardyggum framleiðsluháttum. Norðurlendskt samstarv um vistsnið fremur nýskapan og betri tilfeingisgagnnýtslu í økinum. Samstarv og lutan av royndum viðvíkjandi ymsum stýriamboðum og stuðlandi tiltøkum til at fremja ringbúskap eru týdningarmikil, eitt nú hvussu ymsar fyritøkur ella kommunur og fyritøkur samstarva fyri at nýta tilfeingi hjá hvørjum øðrum við nýggjum skipanarloysnum í sonevndum ídnaðarligum samspæli.

## 2.2 Tilfeingiseffektivar og eiturfríar ringrásir

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at stimbra arbeiðið at byrgja fyri og minka um nøgdina av ruski og vaksa um endurnýtsluna av tilfari
- at arbeiða fyri at menna nýskapandi og kappingarførar ruskloysnir í Norðurlondum
- at arbeiða strategiskt fyri at gevast at brúka serliga vandamikil evnir og minka um vandarnar, sum standast av vandamiklum evnum

Ruskstigskipanin skal brúkast í øllum samfelagnum. Yvirskipað ræður um at forða fyri, at rusk verður framleitt, bæði við atliti at nøgd og vanda, so at tað slepst undan skaðiligari ávirkan á heilsu og umhvørvi. Fyri rusk, sum verður framleitt, er útgangsstøðið, at tað í fyrstu syftu skal virkast til endurnýtlsu, í aðru syftu tilfarsendurvinnast, í triðju syftu endurvinnast á annan hátt og at enda beinast burtur. Arbeiðast skal fyri at basa dálking.

Tilfar skal framleiðast meira burðardygt, vandamikil evnir skulu fáast úr ringrásum, og tað skal vera møguligt og trygt at endurvinna tilfar. Tørvur er á fleiri átøkum at skapa marknaðir fyri endurvunnum tilfari. Eitt nú skal menningin av nýggjum nýskapandi loysnum fremjast, millum annað til endurvinning. Tað er eisini virðismikið at menna treytir fyri endurvunnum tilfari, so at slíkt tilfar skal lúka somu høgu krøv við atliti at innihaldi av vandamiklum evnum sum nýtt tilfar á teimum ymsu nýtsluøkjunum.

Serliga úr altjóða sjónarhorni er tørvur á samstarvi eftir allari virðisketuni, so at tilfeingið verður brúkt sum best og missurin avmarkaður sum mest. Tørvur er somuleiðis á at menna samstarvið um at basa ólógligum ruskvirksemi og flutningi av ruski tvørtur um landamørk.

Fyri at minka um tær skaðiligu avleiðingarnar av plasti, eitt nú mikroplasti, eigur norðurlenska samstarvið um plast at halda fram.

## 2.3 Burðardyggir býir

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at menna lutan av royndum og samstarv um norðurlendskar loysnir við atliti at burðar-dyggari býarmenning
- at virka fyri, at norðurlendskir býir mennast sosialt, umhvørvisliga og búskaparliga sum íkast til at fremja Nýggju býardagsskránna hjá ST og Býardagsskránna hjá ES

Útgangsstøðið fyri burðardyggari býarmenning er ein heildaráskoðan á býin. Hon fevnir um átøk og heildarloysnir fyri skipan og bygging av undirstøðukervi og bygningum, sum so styðja upp undir størri burðardygd og góðar liviumstøður. Burðardyggar flutningsloysnir og veðurlagsgott flytføri eru ein týðandi partur av býarmenningini. At persónflutningur skiftir frá persónbilum til aðrar flutningshættir sum gongd, súkklu og almenna ferðslu, og at lagt verður um til endurnýggjandi rekevni og el, kann minka um umhvørvisávirkanina av ferðandi og samstundis hava betri luftgóðsku og minni óljóð við sær. Samstarvið eigur at hava ferðaatferðina hjá ymsum bólkum í huga. Grønari býir við fleiri grasagørðum, lítlari fjarstøðu til útilívsøkir og sterkum vistskipanum kunnu betra um fyritreytirnar fyri veðurlagstillaging og betri lívsgóðsku. Atgongdin at góðum ljóðumhvørvi eigur at fáa størri ans. Norðurlond hava nógv til felags, tá ið ræður um samfelagsbygnað og býaravbjóðingar. Londini kunnu læra av hvørjum øðrum fyri at finna tær bestu nýskapandi loysnirnar og stýriamboðini til at loysa veðurlags- og umhvørvisavbjóðingarnar í okkara býum. Norðurlendskt samstarv um burðardyggar býir kann gera sítt til at loysa veðurlagsavbjóðingar og røkka framstigum, tá ið ræður um at fremja Agenda 2030, Nýggju býardagsskránna hjá ST og Býardagsskránna hjá ES.

## 2.4 At slóða fyri grønari umlegging í Norðurlondum

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at virka fyri at menna felags altjóða háttaløg, tá ið ræður um mát fyri árininum av nýtslu á umhvørvi og veðurlag
- at menna norðurlendska samstarvið og lutanina av royndum við atliti at stýriamboðum og tiltøkum til frama fyri grøna umlegging
- at stuðla og taka lut í samrøðu um at menna fíggingarloysnir til frama fyri grøna um-legging

Norðurlond vísa, at tað ber til at avmarka útlát og kortini hava búskaparliga framgongd. Samstundis er vaksandi nýtsla í stóran mun farin fram við at flyta inn vørur, sum hava skaðiligar umhvørvisavleiðingar í øðrum londum. Vaksandi altjóða flutningur av lívrunnum brennievni hevur eisini skaðiliga ávirkan á umhvørvi og veðurlag. Arbeiðið at finna nýggjar hættir at máta heildarávirkanina og koma burtur frá eintáttaðari nýtslu av

gomlum vælferðarmátum eigur at halda fram í samstarvi við OECD og ES. Tað er umráðandi at taka virknan lut í ES-arbeiðinum, tá ið ræður um at menna umhvørvisspor (PEF/OEF).

Fíggingarstreymar skulu beinast móti umhvørvis- og veðurlagsgóðum íløgum, lutvíst fyri at slóða fyri grønari umlegging og lutvíst fyri at fíggja loysnir, sum úr vanligum fíggingarsjónarhorni verða mettar at at bera stóran váða í sær. Hetta krevur nýhugsan í fíggjargeiranum og møguliga eisini nýggj ella øðrvísi almenn átøk. Norðurlendska samstarvið eigur framhaldandi at verða ment við tí fyri eyga at eyðmerkja trupulleikar, loysnir og møgulig stuðlandi tiltøk. Burðardygdareftirlit við triðjaparti, marknaðir fyri grøn lánsbrøv, grøn samansparing og nýskapandi innkeyp eru møgulig átøk. Norðurlendsku fíggingarstovnarnir NEFCO, NIB og NDF kunnu framhaldandi hava ein týðandi leiklut í tí grønu umleggingini, og hesum eigur greiða at verða gjørd fyri í samráð við ávirkaðar geirar.

Norðurlond hava bæði drúgvar og hepnar royndir við at brúka búskaparlig stýriamboð og onnur marknaðargrundað stýriamboð og at samstarva um hesar spurningarnar. Tað er umráðandi, at samstarvið heldur fram fyri at fremja burðardygga menning, millum annað góðkenning, útbúgving, tilstuðling og annað samskifti. Umhvørvisfyrilit skulu sameinast við alment virksemi og vinnulívið til at byrgja fyri skaðiligum árinum á umhvørvi og veðurlag.

# 3. Veðurlag og luft

## Mið

- Norðurlond hava gjørt sítt til at fremja Paríssáttmálan miðvíst fyri at kunna røkka málum um at halda alheimsupphitingini undir tveimum stigum og helst undir hálvum øðrum stigi
- Norðurlond ganga framvegis undan í tí grønu umleggingini, sum krevst til at lúka málini í Paríssáttmálanum, við miðvísum málum og tiltøkum
- Norðurlendska samstarvið miðar eftir at ganga undan viðvíkjandi UNECE-sáttmálanum um langtíðar luftdálking tvørtur um landamørk, í ES/EBS og á tjóðarstigi fyri framhaldandi at skerja útlátið av umvhørvis- og heilsuskaðiligari luftdálking í øllum UNECE-økinum.
- Norðurlond hava skundað undir betri gagnnýtslu av samvirkan gjøgnum meira sameint arbeiði á luft- og veðurlagsøkinum

Veðurlagsbroytingarnar teljast millum tær størstu avbjóðingarnar hjá mannaættini. Heimsútlátið av veðurlagsgøssum má skerjast munandi og skjótt. Vakstrarhúsgøssini hópast upp í lofthavinum gjøgnum drúgva tíð, og tí skal nettoútlátið í heiminum niður á null, og sum frá líður væntandi skerjast enn meira, skal tað eydnast at røkka hitamálunum í Paríssáttmálanum. Samstundis mugu samfeløgini lagast eftir tí broytta veðurlagnum, so at tey verða minni viðkvom. Minkast má eisini um luftdálkingina av veðurlags- og heilsuávum.

Ofta fylgjast átøk á veðurlags- og luftøkinum. Luftdálking og veðurlagsbroytingar hava í nógvum førum bæði felags orsakir og felags loysnir, sum ofta viðvíkja brenning av lívrunnum brennievni. Tað er umráðandi alsamt at gera greiðu fyri hesum sambondunum og leggja felags ætlanir fyri átøkum. Tørvur er á at geva luftdálking og heilsu serligan ans, og í tí sambandi hevur tað stóran týdning at minka um bitlar, sót og sambindingar av køvievni í luftini. Norðurlond eiga eisini at gera sítt til at menna nýggjar brennievnis- og flutningsloysnir og leggja um til munadyggari akfør við minni útláti.

Tørvur er á miðvísum átøkum og kappingarførum loysnum, eitt nú alsamt at menna nýggja nýskapandi og burðardygga tøkni. Norðurlond hava serliga góðar fyritreytir, sum eiga at verða varðveittar og stimbraðar: felags elmarknaðin, vatnorku, sum er stórur partur av orkuveitingini, vindorkutøkni, sólorku, lívorku og jarðhita. Elbilamarknaðurin er í stórari menning, og norðurlendskar fyritøkur, sum menna nýggja tøkni, vaksa alsamt í lutfalli. Tann stóra fjarstøðan og tað kalda veðurlagið geva serligar avbjóðingar. Felags tørvur er á at menna nýtsluna av lívmegni til orku og tilfar,

samstundis sum tað lívfrøðiliga margfeldið og koltvísúrnisburturbeinarar verða varðveitt. Tørvur er á meiri vitan um tiltøk, sum kunnu skerja útlátið úr lívrunnum lendi og vaksa um kolevnisgoymsluna í lendinum. Alt fleiri norðurlendskir borgarar búgva í býum, og tað krevur burðardygga býarmenning at betra um luftgóðskuna og loysa veðurlagsavbjóðingina. Fyri at skerja útlátið av vakstrahúsgassi er tørvur á at menna nýtt tilfar og munadyggari tilfeingisnýtslu í tí bygda umhvørvinum. Í Norðurlondum er nógvur orkukrevjandi ídnaður við stórari nýskapanarmegi og serligum avbjóðingum. Ringbúskapur kann gagna veðurlagnum. Á altjóðapallinum kunnu Norðurlond vísa fyridømi um samstarv. Tað kann eitt nú geva kappingarfyrimunir og vísa, at umleggingin bæði kann ganga skjótari og vera bíligari, enn áður hildið.

Norðurlond skulu framvegis samstarva í altjóða samráðingum um veðurlag (serliga UNFCCC) og luft (serliga CLRTAP) umframt at arbeiða við felags átøkum, sum slóða fyri framstigum í samráðingararbeiðinum.

Norðurlond taka undir við veðurlagsgransking og vitanargrundaðum politikki við støði í teimum bestu tøku vísindunum. Londini skulu tí framhaldandi stuðla Veðurlagsnevndini hjá ST (IPCC) bæði fíggjarliga og við granskingarátøkum. Saman eiga londini serliga at raðfesta samskiftisátøk til at breiða út týdningarmiklar niðurstøður hjá IPPC bæði í Norðurlondum og í restini av heiminum. Norðurlond eiga eisini virkið at granska í veðurlagsbroytingunum, hvussu tær kunnu avmarkast, og hvussu veðurlagssterk samfeløg verða skapt á bestan hátt.

## 3.1 Paríssáttmálin[1] og altjóða veðurlagsarbeiðið

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at virka fyri miðvíst at fremja Paríssáttmálan, bæði við atliti at útlátsskerjing, veðurlagstillaging og fígging
- at virka fyri, at hægri mál sum frá líður verða sett fyri heildaríkastið til frama fyri veðurlagið í samsvari við ambitiónsmekanismuna í Paríssáttmálanum
- at fáa til vega, fremja og áhaldandi menna eitt dygt regluverk fyri Paríssáttmálan við atliti at gjøgmnumskygniskarminum (MRV) og heimseftirlitinum í 2023
- at halda fram at ganga á odda og samstarva fyri at skunda undir veðurlagsumleggin-gina í Norðurlondum, í ES og í heiminum øllum

Paríssáttmálin leggur lunnar undir heimsfevnt arbeiði, sum stig fyri stig skal skerja veðurlagsútlátið í heiminum. Norðurlond, sum høvdu ein undangonguleiklut í arbeiðinum at fáa Paríssáttmálan settan í verk, skulu nú virka fyri, at teir einstøku partarnir í sáttmálanum verða framdir miðvíst. Skal skipanin vera trúverd, krevst eitt dygt regluverk, og Norðurlond skulu virka fyri at fáa í lag, fremja og áhaldandi menna

[1] Danmark hevur tikið eitt landøkisfyrivarni fyri Grønland

ein dyggan gjøgnumskygniskarm. Tað, at Paríssáttmálin skjótt kemur í gildi, eggjar pørtunum til í góðari tíð at fara undir arbeiðið at menna sítt tjóðarásetta íkast (NDC) til at avmarka útlátið sum liður í eini munadyggari og væl virkandi ambitiónsmekanismu undir Paríssáttmálanum. Ambitiónsstigið í teimum núverandi NDC'unum er ov lágt, skal tað skal eydnast at røkka teimum settu hitamálunum. Heimseftirlitið í 2023 er avgerandi sum tileggjan til, at útlátið í heiminum verður skert í stigum í samsvari við tey vísindaligu tilmælini. Norðurlond skulu virka fyri hægri ambitiónssstigi í øllum heiminum. ES eigur, sum allir aðrir partar, at endurskoða sítt NDC út frá serfrøðifrágreiðingini hjá IPCC um 1,5 stig og úrslitinum av Talanoa-samrøðuni, sum mælir til at meta um heildaríkastið hjá pørtunum í mun til langtíðarmálini fyri útlátsskerjing eftir sáttmálanum. Saman fara Norðurlond framhaldandi at arbeiða fyri samrøðu og semju millum ymsar landabólkar í veðurlagssamráðingunum.

Altjóða samstarv er ein lykil til at røkka málunum í Paríssáttmálanum. Grein 6 í Paríssáttmálanum vísir á nýggjar altjóða samstarvshættir. Norðurlond plaga at gera sítt til at menna altjóða mekanismur til veðurlagssamstarv og eiga eisini framhaldandi at geva sítt íkast, millum annað til gjøgnum gransking og royndarvirksemi at menna háttaløg.

Norðurlond skulu ganga undan í sambandi við Montreal-ískoytið fyri at gera sítt til at skerja heimsútlátið av HFC-gassi og virka fyri, at miðað verður høgt, tá ið ræður um, hvussu víða ískoytið skal fevna.

Arktis hitnar meira enn tvær ferðir skjótari, enn jørðin hitnar í miðal, og hetta fær beinanvegin avleiðingar fyri bæði samfeløg og vistskipanir. Norðurlond skulu styðja arbeiðið hjá Arktiska ráðnum at stimbra mótstøðuførið og kanna avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum í norðurøkjunum, og londini skulu hava ein virknan leiklut í at minka um nøgdina av veðurlagsávirkandi gøssum, eisini stuttlívaðum, sum ávirka Arktis. Arbeiðið við hesum málunum skal eisini halda fram í samgonguni fyri veðurlag og luft (CCAC).

Tá ið ræður um altjóða skipa- og loftferðslu, er gongd komin á eitt skifti til reinari rakstur og menning av nýggjum brennievni, men hetta skal ganga munandi skjótari. Norðurlendskt arbeiði í altjóða skipa- og loftferðslufelagsskapunum, IMO og ICAO, er týdningarmikið, serliga tí at hetta útlátið ikki er fevnt av Paríssáttmálanum, samstundis sum vandi er fyri, at útlátið frá altjóða skipa- og loftferðslu fer at økjast munandi.

## 3.2 Fígging

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at virka fyri eini umlegging av fíggjarstreymum, so at teir styðja upp undir veðurlagssterka menning við lítlum útláti
- at virka fyri, at tað eydnast at seta tiltøk í verk við stuðli frá norðurlendskari veðurlagsfígging

Ídnaðarlondini hava eitt felags mál um at útvega 100 milliardir amerikanskar dollarar um árið fram til 2020 og at leingja lyftið til 2025. Á partafundinum í 2025 skal nýtt mál ásetast við teimum 100 milliardunum sum gólvi. Til at útvega privata veðurlagsfígging og til at beina fíggjarstreymar móti endurnýggjandi og ólívrunnum loysnum krevst samstarv millum almennar og privatar partar. Norðurlond geva og skulu framhaldandi geva sítt týdningarmikla íkast til altjóða veðurlagsfígging, í tvílandasamanhangi og við íkøstum til fleirlanda umhvørvis- og veðurlagsgrunnar umframt við at vísa á nýskapandi loysnir.

## 3.3 Rammuverk og stýriamboð til at skerja útlát

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at luta norðurlendskar royndir viðvíkjandi politikkgrundarlagi og veðurlagspolitiskum rammuverkum umframt at breiða út hepnar royndir til onnur lond
- at arbeiða fyri framhaldandi at menna útlátshandilin hjá ES og gera hann munadyggari, samstundis sum fyritreytirnar fyri at skerja útlát verða mentar í tí ikki-handlandi geiranum
- at arbeiða við at eyðmerkja, hvussu tey norðurlendsku stýriamboðini kunnu gerast munadyggari, og virka fyri at minka um vandan fyri lekum av vakstrarhúsgøssum og kappingaravlagan

Norðurlond skulu samstarva um politikkgrundarlag fyri umlegging til eitt samfelag við lítlum útláti av vakstrarhúsgøssum í Norðurlondum og í heiminum øllum. Menningarleiðir, góð fyridømir og møguligar umleggingar eiga at verða greinað við tí fyri eyga at røkka lítlum útláti og størri upptøku av vakstrarhúsgøssum í samsvari við langtíðarmálini í Paríssáttmálanum.

Fleiri Norðurlond hava fingið veðurlagspolitisk rammuverk við lagntíðarmálum. Øll londini hava veðurlagslóggávu, og íverksetan er í gongd. Norðurlond eiga at fara undir at luta royndir sínámillum við tí fyri eyga at læra hvørt av øðrum.

Útlátið skal skerjast munandi, bæði í Norðulondum og heiminum annars, til øldin er hálvrunnin, men eisini eftir tað. Samstarvið um at menna og seta saman munadygg

veðurlagspolitisk stýriamboð eigur at halda fram. Tað er umráðandi at seta ein prís á útlát. Tí eigur ES-/EBS-skipanin við útlátskvotum framhaldandi at verða ment við tí fyri eyga at stimbra prníssignalið og gera skipana munadyggari. Eisini á øðrum økjum, eitt nú flutningsøkinum, krevjast framsøkin tiltøk á evropeiskum stigi til at skunda undir umleggingina og tryggja, at veðurlagsmál verða rokkin.

Skal útlátið skerjast kostnaðarmunadygt, mugu regluverk og stýriamboð mennast, so at vantandi munadygd og lekar av vakstrarhúsgøssum ikki taka seg upp millum lond. Hetta skeiðið eiga Norðurlond tí at hyggja nærri at teimum ymsu noðurlendsku stýriamboðunum. Góð og kostnaðarmunadygg dømir um stýriamboð eiga at verða tikin fram og alsamt breidd út uttan fyri Norðurlond til íblástur og til at stuðla veðurlagsarbeiðinum í øðrum londum.

## 3.4 Veðurlagstillaging

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at samstarva um at luta royndir viðvíkjandi veðurlagstillaging og menna átøk til frama fyri veðurlagstillaging

Verðurlagsbroytingarnar eru atvold til broytt hitalag, sum ávirkar sjóvarmálan, ísbræðingina, sýruinnihaldið í havinum og avfallið og elvir til størri vanda fyri ógvisligum veðri. Hetta fær avleiðingar fyri nógv samfelagsøkir umframt vistskipanir. Meiri avfall elvir til størri vanda fyri vatnflóð og kann eisini elva til berg- og skriðulop og máan, tá ið lendisjavnvágin fer av lagi. Av øðrum avleiðingum av broyttum veðurlagi kunnu nevnast broytt luftvæta og kavanøgd, hitabylgjur, turkur, størri vandi fyri eldi, verri vatngóðska og vandar fyri ymsar stovnar av sløgum *(species)* og tað lívfrøðiliga margfeldið. Serligar avbjóðingar standast av broytingunum í Arktis.

Nógvar av avbjóðingunum, sum standast av broyttum veðurlagi, hava Norðurlond í felag, og londini kunnu samstarva um at menna mótstøðuført og burðardygg samfeløg og at umsita lendi og vatn við fyriliti fyri veðurlagsbroytingunum. Tað er vaksandi tørvur á at veðurlagstillaga býirnar og greina, hvussu teir ávirka umhvørvið uttanum. Farið eigur tí at verða undir størri norðurlendskt samstarv við tí fyri eyga at luta vitan og royndir landanna millum og at skunda undir átøk til frama fyri veðurlagstillaging og vitan um, hvussu loysnir til frama fyri veðurlagstillaging og útlátsskerjing kunnu sameinast.

## 3.5 Luftdálking

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at ganga undan í sambandi við luftverndarsáttmálan (CLRTAP) og soleiðis virka fyri minni luftdálking í Norðurlondum, Evropa og Arktis og fyri, at høg mál verða sett, tá ið ræður um, hvussu víða ískoytið skal fevna, og endurskoðan í framtíðini
- at arbeiða virkið í ES/EBS fyri alsamt at skerja útlátið av umhvørvis- og heilsuskaðiligari luftdálking
- at samstarva og luta royndir í arbeiðinum at menna luftverndarætlanir fyri londini innan fyri karmin á tí nýggju loftfyriskipanini hjá ES (NECD)
- at økja um vitanina um árin av luftdálking og um sambandið millum luft og veðurlag umframt at virka fyri meira samfeldum atgerðaætlanum

Luftdálkingin er minkað munandi í Evropa og Norðuramerika tey seinastu 30 árini. Súrganin er tálmað, vistskipanir verða stimbraðar, og fiskur leitar aftur í vøtn, har ið hann hevur verið nærum útdeyður. Hóast hetta, og hóast luftgóðskan í Norðurlondum er lutfalsliga góð sammett við onnur lond, er luftdálking framvegis heilsuni hjá fólki og vistkipanum at stórum skaða. Niðurbrótingin av reaktivum køvievni megnar ikki at fylgja við tilførsluni frá mannavirksemi. Køvievnissambindingar hópast tí upp í vistskipanum, og hetta ávirkar veðurlagið og elvir til súrgan, ovtaðing og minkandi lívfrøðiligt margfeldi. Meiri ljós eigur at verða varpað á hesi viðurskiftini.

Luftdálking er atvold til álvarsligar heilsutrupulleikar sum hjarta- og æðrasjúkur, ígerðarsjúkur í andaleiðini og krabbamein. Børn eru serliga viðkvom fyri luftdálking, og ávirkanin er størst hjá pinkubørnum. Luftdálking kann umframt andaleiðina ávirka ta fatanarligu menningina hjá børnum. Keldurnar til vánaliga luftgóðsku í nærumhvørvinum eru fyrst og fremst ferðsla og smávegis kynding við brenniviði. Trupulleikin er størstur í býunum. Bæði luftgóðska og óljóð eru týðandi tættir í burðardyggari býarmenning. Norðurlond eiga at halda fram at samstarva, so at tey kunnu luta royndir við góðum arbeiðsháttum sínámillum, læra av hvørjum øðrum, kanna nýggj stýriamboð og skunda undir, at hægri mál verða sett í regluverkinum hjá ES.

Norðurlond verða ávirkað av luftdálking bæði úr Evropa og av øðrum meginlondum. Samstundis verður stórur partur av útlátinum í Norðurlondum útfluttur. Hóast vit hava sæð stór framstig í altjóða luftverndararbeiðinum, er framvegis tørvur á munandi átøkum til at skerja tað luftdálkandi útlátið, millum annað fyri at lúka tey herdu útlátskrøvini í tí nýggju ES-fyriskipanini um at skerja tjóðarútlátið av ávísum lofthavsdálkingarevnum (NECD). Tá ið londini seta fyriskipanina í verk, skulu tey gera egnar luftverndarætlanir, sum vísa, hvussu tey fara at halda seg undir teimum nýggju útlátsloftunum. Í tí sambandi kunnu Norðurlond geva hvørjum øðrum íblástur til átøk og stýriamboð til at halda sínar skyldur. Saman skulu Norðurlond framvegis vera virkin í arbeiðinum við luftverndarsáttmálanum (CLRTAP) og geva sítt íkast við vitanarstøði.

Tørvur er á størri vitan um heilsuárin og árin av reaktivum køvievni, amoniakki og lívrunnum evnum sum VOC.

Norðurlond eisini eisini at samstarva um átøk og amboð, sum kunnu skerja útlátið av veðurlagsgøssum, bitlum (sót íroknað), $NO_x$ og aðrari luftdálking frá sigling í Norðurlondum og Arktis nú og í framtíðini. Altjóða loysnir gjøgnum IMO hava stóran týdning. Tørvur er eisini á stýriamboðs-, árins- og kostnaðargreiningum, serliga undan altjóða avtalum og ES-fyriskipanum, fyri at skerja útlát av smáum bitlum og køvievnissúrni frá teimum týdningarmestu keldunum og kanningum av útláti av og styrki á smáum (fínum og elafínum) bitlum, umhvørvisskaðum og heilsuárinum.

# 4. Evnindir – umhvørvi og heilsa

## Mið

- Norðurlendska samstarvið hevur gjørt sítt til at minka um vandarnar fyri fólk og umhvørvi av evnafrøðiligum evnum og evnindum í vørum
- Norðurlendska arbeiðið hevur gjørt sítt til, at fyritøkur, sum virka og brúka evnindir, leggja seg eftir útskifting og, alt tað er gjørligt, gevast at brúka serliga vandamikil evnir
- Norðurlendska arbeiðið hevur gjørt sítt til at vaksa um vitanina um vandamikil evnir og menning av háttaløgum til at meta um og handfara vandar við bólkum av vandamiklum evnum
- Norðurlendska arbeiðið hevur gjørt sítt til, at hægri mál verða sett í evnindaarbeiðinum í ES og í heiminum
- Norðurlendska samstarvið hevur gjørt sítt til at breiða út vitan um vandamikil evnir til brúkarar

Vandamikil evnir í vørum eru ein vaksandi trupulleiki. Við tí skjótu søluni av vørum sum heimaelektronikki, klæðum og leikum í okkara gerandisumhvørvi koma vit alt meira í samband við vandamikil evnir. Fleiri granskingarkanningar vísa, at evnir, sum verða mett at vera hormonórógvandi og krabbameinselvandi, eru at finna í blóði, landi og bróstamjólk. Fyri at minka um vandarnar og verja fólk og náttúru mugu vit minka um útbreiðsluna av vandamiklum evnum.

Norðurlond hava leingi gingið undan í evnindamálum. Við eftirliti og virknum fyribyrgjandi arbeiði við merking, við eyðmerking av evnindavandum og við at skifta vandamikil evnir út hava londini lagt nógv fyri. Norðurlendskt samstarv um evnindamál hevur verið serstakliga væleydnað, tá ið ræður um at ávirka, menna og fremja reglur í ES/EBS, eitt nú REACH, og at skunda undir í altjóða arbeiðinum. Miðast skal framvegis eftir at røkka einum eiturfríum gerandisdegi. Serligur dentur skal leggjast á at verja børn, fostur og nøring.

Meginreglan um fyrivarni skal vera grundleggjandi í arbeiðinum at byrgja fyri vandum, sum standast av evnindum. Eitt týdningarmikið stig er at leggja arbeiðið til rættis við tí fyri eyga, til dømis við at fyritøkur sjálvar skifta út, at fáa fyritøkur at gevast at brúka serliga vandamikil evnir í vørum og framleiðslu í ES og at flyta slík evnir inn í ES. Arbeiðið at økja um vitanina og gera kunnandi tilfar um slík evnir í vørum og framleiðslu atkomandi í veitingarketunum skal halda fram. Miðast skal eftir at minka um og avmarka nýtsluna av vandamiklum evnum. Eisini er umráðandi at fylgja slóðini hjá

evnunum, hvussu tey verða brúkt, og hvussu tey finnast í fólki og umhvørvi. Tá ið royndir verða lutaðar í Norðurlondum og í ES-arbeiði, skal dentur leggjast á hesi viðurskiftini. Arbeiðið at framleiða vitan um avleiðingarnar av, at einki verður gjørt, skal halda fram og mennast.

Til at røkka einum ringbúskapi krevjast eiturfríar ringrásir. Norðurlendska samstarvið skal tí halda fram at menna arbeiðið at forða fyri, at vandamikil evnir halda fram at vera í ringrás.

Ljós má framvegis varpast á vandarnar av nanotilfari og hormonórógvandi evnum, eitt nú at við menna vitanarkrøv og nýtsluna av kanningarháttum til heilsu- og umhvørvisárin umframt at menna onnur viðkomandi krøv eftir ES-regluverkinum og á altjóðastigi gjøgnum OECD. Tá ið ræður um eftirlitsvirksemi, er vaksandi vørukeyp á alnetinum eitt øki, sum tað er serliga umráðandi at lyfta.

Norðurlendska arbeiðið eigur at varpa ljós á evnindamál, sum eru fevnd av aðrari lóggávu, eitt nú evnindir í  matvørum og drekkivatni. Tað geldur eisini fyri aðrar heilsu- og umhvørvisvandar, eitt nú heilivág í umhvørvinum, har ið norðurlendskt samstarv um antibiotikamótstøðuføri longu er í gongd. Tørvur kann eisini vera á at varpa ljós á, hvussu evnindir og heilivágur ávirka lívfrøðiligt margfeldi. Norðurlond skulu eisini arbeiða virkið við at menna tøkni, sum tryggjar betri reinsan og handfaring av vandamiklum evnum.

## 4.1 Eginleikar og vandar við evnunum

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at økja um vitanina um evnir og eginleikar og vandar við teimum
- at brúka hesa vitanina til at fáa fyritøkur í størri mun at skifta vandamikil evnir út við minni vandamikil
- at virka fyri, at flokkanin av vandamiklum evnum verður ment í evnindaregluverkum hjá ES
- at vandar, sum standast av, at vandamikil evnir verða brúkt, verða avmarkaðir mest møguligt
- at kunning um evnindir í tilfari, vørum og ruski verður gjørd atkomandi og brúkt til at byrgja fyri, at umhvørvi og heilsa verða fyri skaða
- at samstarva um eftirlit við evnindum í vørum og framleiðslu, í endurvinning og í alnetshandli

Av tí at tað støðugt leggjast nýggj evnir afturat, sum verða brúkt í framleiðslu og vørum, og av tí at nøktandi greiða ikki er fingin á, hvussu vandamikil slík evnir eru, er tað umráðandi at yvirlitskanna, hvar ið evnini finnast í umhvørvinum og gerandisdegnum hjá fólki.

Tørvur er á at útvega vitan um evnir, eginleikar og vandar skjótari og munadyggari enn í dag. Hetta kann millum annað gerast við at menna, brúka og seta í verk nýggjar kanningar- og ikki-kanningarhættir umframt nýggjar loysnir og amboð.

Vanliga verður eitt evni viðgjørt í senn. Lagt verður sjáldan upp fyri heildarávirkanini, sum stendst av einum og sama evni ella nærum samlíkum evnum frá ymsum keldum. Verða evnir viðgjørd í bólkum, alt eftir evnafrøðiligum bygnaði, virknaðarhátti, eginleikum ella nýtsluøki, kann tað bøta munandi um arbeiðið við evnindum.

Tá ið mannagongdir verða mentar fyri, hvussu metast kann um evnafrøðilig evnir í bólkum, mugu møguleikar at leggja upp fyri heildarávirkan og samansettum virknaði takast við. Norðurlond skulu framhaldandi geva sítt íkast við at útvega grundarlag fyri avgerðum og á tann hátt í góðari tíð virka fyri, at ES tekur fleiri evnir upp.

Ein grundleggjandi liður í tí fyribyrgjandi evnindaarbeiðinum er at skifta vandamikil evnir út við minni vandamiklar valmøguleikar. Arbeiðið við útskifting fremur eisini nýskapan og kann geva framsøknum fyritøkum handils- og útflutningsmøguleikar. Norðurlendska samstarvið kann gera sítt til at skunda undir útskiftingararátøk hjá vinnulívinum. Norðurlendska samstarvið eigur at virka fyri, at nýtslan av vandamiklum evnum, alt tað er gjørligt, heldur uppat. Serliga týdningarmikil eru langlívað evnir, serliga flúrrík evnir, bisfenol og onnur hormonórógvandi evnir umframt nervaeitrandi evnir. Nýtslan av evnum, sum tað er trupult at bróta niður, lívsavnandi (bioakkumulerandi) og eitrandi evnum (PBT), ovurviðkvæmiselvandi evnum, evnum, sum eru krabbameinselvandi, úrbregðiselvandi (mutagen) og nøringarórógvandi (CMR), og evnum, sum elva til heilaskaða undir menningini, skal, alt tað er gjørligt, halda uppat.

Umhvørviseftirlit, savnað vitan um útlát og evninda- og vørueftirlit hava stóran týdning, og eisini í hesum sambandi eiga Norðurlond at samstarva til tess at menna góðar mannagongdir og varpa ljós á ávirkan tvørtur um landamørk. Vitanin, sum finst í norðurlendskum evnindadátugrunnum, skal havast sum grundarlag í arbeiðinum at viðgera vandar, tá ið ES-lóggávan um evnindir og plantuverndarevnir verður sett í verk til at forða fyri skaðiligum heilsu- og umhvørvisárinum, og tá ið altjóða avtalur verða mentar.

Vitan um nýtslu av serliga vandamiklum evnum í tilfari, vørum og ruski skal vera alment atkomandi og til taks hjá fyritøkum, sum virka og marknaðarføra evnindir, og teirra kundum, so at umhvørvi og heilsa ikki verða fyri skaða. Betri vitanarskipanir og meira og munadyggari samskifti eiga at verða ment í veitaraliðinum. Við tí vaksandi innflutninginum av vørum við vandamiklum evnum er tørvur á heimsfevndum átøkum til at loysa trupulleikan.

Tørvur er á at kunna brúkarar beinleiðis, t.d. við merking og nýggjum miðlum. Serlig kunning um árin á børn og barnakonur er týdningarmikil. Møguleikarnir fyri norðurlendskum samstarvi hesum viðvíkjandi eiga at verða kannaðir.

## 4.2 Heimsfevnt evnindaarbeiði

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at arbeiða heimsfevnt fyri at menna nýggj mál og ætlanir fyri evnindum og ruski og avmarka útbreiðsluna av serliga vandamiklum evnum
- at arbeiða fyri betri flutningi av vitan um vandamikil evnir
- at varpa serligt ljós á evnindir og teirra avleiðingar í norðurøkjunum og Arktis

Hetta skeiðið verður støða tikin til týðandi mál í altjóða arbeiðinum við evnindum, tá ið nýggj mál og ætlanir fyri skeiðið hinumegin 2020 verða ment í SAICM.

Norðurlond fara at arbeiða fyri at menna altjóða arbeiðið at avmarka vandamikil evnir, bæði innan fyri karmin á Minamata-sáttmálanum, Stokkhólmssáttmálanum og Montreal-ískoytinum (fremjing av Kigali-ískoytinum íroknað) og við at virka fyri, at onnur vandamikil evnir, sum verða breidd út um heimin, eisini verða fevnd av altjóða sáttmálum. Á henda hátt skunda Norðurlond undir, at vandamikil evnir verða útskift.

Av tí at tað mesta av evnindaframleiðsluni í heiminum fer fram uttan fyri ES/EBS-økið, má størri ábyrgd takast á heimsstigi av at framleiða vitan um eginleikarnar hjá evnunum og breiða vitanina út. Norðurlond mugu framvegis bjóða sær til í arbeiðinum við kanningarháttum í OECD umframt at virka fyri øktari tillaging av flokkanartreytum gjøgnum GHS (tann heimsfevnt samskipaða flokkanar- og merkingarskipanin).

Við at breiðast í føðiketuni, við langvegis flutningi loftvegis og orsakað av ruski, hava vandamikil evnir breitt seg í norðurøkjunum, serliga í teimum arktisku vistskipanunum. Norðurlond skulu framvegis varpa ljós á hesi viðurskiftini, serliga í arbeiðinum í arbeiðsbólkunum AMAP og ACAP undir Arktiska ráðnum.

Altjóða samstarv snýr seg eisini um, í tví- og fleirlandasamanhangi, á ymsan hátt at styðja onnur lond í teirra arbeiði at byggja upp og menna evnindaarbeiðið. Á hesum økinum ganga Norðurlond undan, og londini skulu framhaldandi bjóða sær at luta royndir og tosa við áhugað lond.

# 5. Lívfrøðiligt margfeldi

## Mið

- Norðurlendska samstarvið hevur gjørt sítt til steðga missinum av lívfrøðiligum margfeldi og fremja burðardygga nýtslu og minni syndran av náttúru- og røktarumhvørvum
- Norðurlendska samstarvið hevur gjørt sítt til at vaksa um vitanina um, hvørji árin ið veðurlagsbroytingar og ymiss veðurlagsátøk hava á tað lívfrøðiliga margfeldið
- Norðurlendska samstarvið hevur gjørt sítt til, at Aichi-málini verða rokkin og ment til eitt framsøkið heimsfevnt rammuverk eftir 2020, og at málini verða tikin við í arbeiðið við heimsmálunum fyri burðardygd og Agenda 2030
- Norðurlendska samstarvið hevur gjørt sítt til at økja um vitanina um vistskipanartænastur, og um at vistskipanir kunnu veita týdningarmiklar vistskipanartænastur
- Norðurlendska samstarvið um náttúru- og røktarumhvørvir sum grundarlag fyri útilívi og virðisskapan er ment

Lívfrøðiligt margfeldi er ein fyritreyt fyri, at fólk kunnu liva og trívast. Fjølbroytnisríkidømið í náttúruni skapar møguleikar fyri burðardyggari velting og gagnnýtslu av vaksandi tilfeingi, skapar fyritreytir fyri útilívi og ger sítt til at tálma veðurlagsbroytingunum. Náttúran veitir fólki vistskipanartænstur sum dusting, kolevnisgoymslu og vatn- og luftreinsan. Í Norðurlondum hava fólk víðfevnda atgongd at náttúruni og kunnu umsita náttúruvirðini við millum annað vernd, endurreising, brúki, røkt og viðlíkahaldi. Atgongdin at náttúru, útilívi og røktarumhvørvi er ein týðandi táttur í trivnaðinum hjá fólkinum.

Missurin av lívfrøðiligum margfeldi telist millum tær størstu avbjóðingarnar í heiminum í dag. Margfeldið er útarmað, og náttúran er syndrað orsakað av eitt nú troyting, skógarvinnu, jarðarbrúki og dálking. Stigvísir batar eru hendir, men tørvur er framvegis á at verja náttúruna betur, at menna umhvørvisfyrilit og umvæla økir, eitt nú avveitt vátlendir. Hoygging ella bit hava góða ávirkan á og eru ein fyritreyt fyri tí lívfrøðiliga margfeldinum í slíkum lendi. Nýggjar hóttanir, sum hava tikið seg upp, eru innslødd sløg, sum fóta sær, sjúkur, sum breiðast, og veðurlagsávirkan. Norðurlendska samstarvið skal gera sítt til minka um hóttanirnar móti lívfrøðiligum margfeldi, eitt nú við at arbeiða fyri langtíðarvernd, og fyri at týðandi náttúruumhvørvir verða gagnnýtt burðardygt, umvæld og endurskapt, og at minkað verður um inntriv og syndran av náttúru- og røktarumhvørvum.

Nógvar fyritøkur ávirka tað lívfrøðiliga margfeldið, og tí hevur tað stóran týdning at menna vistskipanargrundaða fyrisiting, og at fyrilit fyri náttúruvirðunum verða tikin við, tá ið avgerðir verða tiknar. Eitt grønt undirstøðukervi má mennast, sum tryggjar tey vistfrøðiligu sambondini í landslagnum. Tað er umráðandi at leggja dent á vistskipanargrundaða fyrisiting, tá ið avgerðir verða tiknar um lendisnýtslu. Samstarv um at menna mannagongdir kann eitt nú snúgva seg um kortlegging, og hvussu til ber at meta um og hava fyrilit fyri vistskipanartænastum. Tørvur er á at menna vitanina um, hvussu norðurlendskt lívfrøðiligt margfeldi verður vart, røkt og umsitið.

Norðurlendskar vistskipanir og sløg *(species)* hava nógv í felag, og í nógvum førum fara stovnarnir tvørtur um landamørkini. Tí krevst samstarv til at forða fyri, at innræsin sløg og sjúkuútbrot breiðast. Norðurlond hava nógv í felag mentanarliga og søguliga, og tí hava londini fleiri av teimum somu avbjóðingunum. Tí er grundarlagið gott fyri norðurlendskum samstarvi um, hvussu vit á bestan hátt verja, umsita og umvæla náttúruna við tí fyri eyga at tryggja tað lívfrøðiliga margfeldið og vistskipanartænasturnar. Verandi samstarv um ílegutilfeingi er somuleiðis týdningarmikið.

Í altjóða samstarvinum um lívfrøðiligt margfeldi hava sáttmálin um lívfrøðiligt margfeldi (CBD) við Aichi-málunum, CITES-sáttmálin og Ramsar-sáttmálin stóran leiklut. Norðurlond hava gjørt sítt til, at altjóða nevndin fyri lívfrøðiligt margfeldi (IPBES) varð sett á stovn. Heimsarvssáttmálin hjá UNESCO og evropeiski landslagssáttmálin eru somuleiðis týdningarmiklir. Norðurlond halda fram at samstarva í altjóða arbeiði og økisarbeiði við lívfrøðiligum margfeldi. Arbeiðið eigur at miða eftir at røkka endamálinum við sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi, og at hetta kann takast við í arbeiðið við heimsmálunum fyri burðardygd og Agenda 2030.

## 5.1 At gagnnýta vistskipanartænastur burðardygt

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at arbeiða fyri burðardyggari fyrisiting av lívfrøðiligum tilfari í longdini við støði í vistskipanarhugsanini

Fyrisitingin av lendi og vatni, eisini havi, skal byggja á vistskipanarhugsanina, so at tað lívfrøðiliga margfeldið og vistskipanartænasturnar kunnu verða varðveitt. Tað ber í sær, at náttúruvirðini skulu varðveitast og tilfeingisnýtslan vera burðardygg úr einum heildarsjónarhorni við tí fyri eyga at tryggja, at vistskipanir verða brúktar við fyriliti fyri mørkunum, sum náttúran setur. Tað geldur serliga fyri lendisvinnu, men eisini vegagerð og –rakstur, býarplanlegging, ferðavinnu og annað. Heildarsjónarhornið eigur eisini at lýsa samfelagstýdningin, sum røktarumhvørvir hava fyri mentanarligar vistskipanartænastur sum frítíðarvirksemi og náttúruupplivingar. Somuleiðis eigur

heilsugagnið av væl virkandi vistskipanum, serliga í og nærindis býarumhvørvum, at verða lýst.

Samstarv krevst við og millum ávirkaðar geirar til at skerja útlát í luft og vatn, at fremja góða dýravernd við so lítlari nýtslu av týningarevnum og antibiotika sum gjørligt, at hava fyrilit fyri framleiðsluevnunum hjá lendinum í longdini og at varðveita hótt sløg og stovnar.

## 5.2 At verja náttúruna og varðveita hennara margfeldi

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at samstarva um at røkka Aichi-málunum og í felag at taka virknan lut í tilgongdini viðvíkjandi nýggjum heimsmálum eftir 2020 í sambandi við sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi
- at samstarva um at varðveita lívfrøðiligt margfeldi og náttúru- og mentanarvirðir í landslagnum, millum annað við at menna eitt grønt undirstøðukervi
- at samstarva um at forða fyri, at innræsin fremmand sløg og sjúka breiðast í náttúruni
- at samstarva um at varðveita og menna góð útilívsøkir
- at samstarva um at savna og framleiða vitan um standin og gongdina hjá sløgum og vistskipanum í Norðurlondum

Tørvur er á burðardyggum arbeiðsháttum í landbúnaðinum og langtíðarvernd av virðismiklari náttúru. Norðurlond gera hvørt í sínum lagi eitt týdningarmikið arbeiði at verja virðismikla náttúru og røkka Aichi-málunum. Tørvur er harumframt á samstarvi, í tví- og fleirlandasamanhangi, um betri vernd í marknaøkjunum. Tørvur er á einum grønum undirstøðukervi til at verja náttúru- og mentanarvirðini í landslagnum, lívfrøðiligt margfeldi og vistskipanartænastur – millum annað við at knýta vistfrøðilig netverk. Til at verja náttúruna og varðveita hennara margfeldi krevjast áhaldandi átøk at framleiða vitan um sløg og vistskipanir.

Aichi-málini galda til 2020, og arbeiðið at seta tey samtyktu málini í verk og at menna nýggj mál eftir 2020 er í miðdeplinum í altjóða arbeiðinum við lívfrøðiligum margfeldi. Fyri londini, sum eru limir í ES, verða málini millum annað sett í verk við ES-strategiini fyri lívfrøðiligt margfeldi. Norðurlond skula virka fyri, at málini verða framd munadygt í øllum økjum og fyri, at í minsta lagi somu mál fara at galda frameftir. Av týdningarmiklum norðurlendskum náttúrusløgum kunnu til dømis nevnast arktisk náttúra, fjallaøkir, náttúrubeiti, slóttubøur, skógur, vøtn, løkir, vátøkir, skergarðar, strendur og hav. Eisini er umráðandi at verja sløg og vistskipanir í Arktis og arbeiða fyri burðardyggari menning í arktiskum økjum. Arbeiðið við lívfrøðiligum margfeldi í Barentsøkinum og í arbeiðsbólkunum CAFF og PAME undir Arktiska ráðnum eigur at verða stuðlað.

Tey seinnu árini er eitt norðurlendskt arbeiði gjørt at avmarka útbreiðsluna av innræsnum, fremmandum sløgum, eitt nú márhundi. Hetta arbeiðið eigur at halda fram. At summi sløg minka í tali við nógvari ferð, ikki minst dustandi skordýr og skeljadýraetandi kaventur, er ein trupulleiki, sum Norðurlond hava í felag. Í fleiri førum vanta eintýdd svar viðvíkjandi orsøkunum, sum búgva undir, og norðurlendskt samstarv um at lýsa og basa hesum hóttanunum hevur nógvar fyrimunir við sær. Norðurlond eiga eisini at samstarva um fyrisiting av sløgum, har ið áhugamálsósemjur taka seg upp við burðardygga lendis-, skógar- og havnýtslu. Tí er umráðandi at halda fram at samstarva um at røkka einum dyggari vitanargrundarlagi fyri framtíðarstigum. Tað sama geldur fyri sjúkuútbreiðslu millum ymiss sløg í Norðurlondum. Tað geldur eisini fyri ávirkan frá havruski á dýralívið í teimum norðurlendsku høvunum og dálking og slit í økjum, sum eru rík við náttúru- og mentanarvirðir.

Umhvørvisdálking og veðurlagsbroytingar hótta røktarumhvørvir og røktarlandslag. Norðurlendska samstarvið eigur eisini at fremja munadygga og hóskandi vernd fyri serstøk røktarumhvørvir og røktarlandsløg.

Tað er umráðandi, at fyritreytirnar eru góðar fyri burðardyggum útilívi, og fyri at náttúru- og mentanarferðavinna kann halda fram at mennast. Tørvur er eisini á framhaldandi norðurlendskum samstarvi um at verja útilívið og, við at menna loysnir fyri burðardygga ferðavinnu, serliga náttúru- og mentanargrundaða ferðavinnu.

## 5.3 Veðurlag og lívfrøðiligt margfeldi

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at skipa arbeiðið við tí fyri eyga at tryggja lívfrøðiligt margfeldi og vistskipanartænastur í veðurlagsarbeiðinum

Veðurlagsbroytingar hótta sløg og vistskipanir. Samstundis hava sterkar vistskipanir týdning fyri at avmarka útlát av vakstrarhúsgøssum og fyri alsamt at laga landsløgini til broytt veðurlag. Av avleiðingum, sum kunnu standast av veðurlagsbroytingunum, kunnu nevnast, at sløg hvørva, at innræsin, fremmand sløg breiðast, at vatnveitingin í keldum broytist, at salt- og súrleikin í havinum verða ávirkaðir, og at vistskipanir fara fyri skeytið orsakað av ov nógvum hita. Veðurlagið broytist skjótari í Arktis, og broytingarnar eru tann størsta hóttanin móti náttúruni har. Norðurlond eiga tí framhaldandi at styðja arbeiðið í Arktiska ráðnum við hesum málunum.

Norðurlendska arbeiðið eigur at miða eftir at menna felags mannagongdir, sum tryggja nýtsluna av vistskipanunum ella gera tær sterkari. Sterkar og mótstøðuførar vistskipanir hava serliga stóran týdning, tá ið veðurlagið broytist. Tað er umráðandi at umvæla vistskipanir, millum annað vátlendir.

Norðurlendskt samstarv kann leggja seg eftir at menna vitan um, hvussu vistskipanir kunnu verða brúktar burðardygt, so at lívfrøðiligt margfeldi verður varðveitt ella umvælt við støði í veðurlagsbroytingunum og tørvinum á veðurlagstillaging. Missurin av lívfrøðiligum margfeldi má steðgast og vendast.

Eisini eiga hepnar royndir við átøkum at verða lutaðar landanna millum, tí stórir partar av Norðurlondum hava lík náttúrusløg og veðurlagsávirkan. Tørvur er eisini á alsamt at menna vitanina um, hvussu vátlendir og skógarøkir verða ávirkað av broyttum veðurlagi, og hvussu tey kunnu stimbrast. Skógarvinnuframleiðsla og lívgrøði hava eisini ein týðandi leiklut sum møguleiki í staðin fyri lívrunnið brennievni og steinrenningargrundað tilfar. Sum lívfeingisbúskapurin mennist, er tað umráðandi samstundis at menna og styrkja fyrilitið fyri lívfrøðiligum margfeldi og øðrum vistskipanartænastum.

# 6. Hav og strendur

## Mið

- Norðurlendska samstarvið hevur gjørt sítt til at menna ta vistskipanaragrundaðu fyrisitingina av havinum
- Norðurlendska samstarvið hevur gjørt sítt til at avmarka, at dálking og rusk enda í havinum, ikki minst plast og mikroplast

Norðurlond hava langar strendur og lítla fjarstøðu til sjógvin. Hetta hevur stóran týdning fyri heilsu og vælferð. Reint hav er ein fyritreyt fyri burðardyggum bláum búskapi. Standurin á sjónum við strendurnar og havinum er eitt álvarsmál. Veðurlagsbroytingar, havsúrgan, fiskiskapur, sum ikki er burðardyggur, rusk, umhvørviseitur, óljóð og mineralútvinning hava skaðiliga ávirkan á vistskipanirnar og vistskipanartænasturnar í havinum. Veðurlagsbroytingar minka um mótstøðuførið hjá havinum, og evnini hjá havinum at taka upp og bróta niður føðsluevnir og eitur og evnini at stýra veðurlagnum verða skerd. Sostatt verða lívfrøðiligt margfeldi og fólkaheilsa ávirkað. Rusk í havinum, plast og mikroplast íroknað, er ein hóttan ímóti strand- og havgrundaðum vinnum sum til dømis fiskiskapi og frítíðarvinnu og soleiðis eisini burðardyggum bláum búskapi. Í Norðsjónum er vigingin millum olju- og gassútvinning og umhvørvisfyrilit ein serlig avbjóðing. Í Landnyrðingsatlantshavi og í Íshavinum eru veðurlagsbroytingarnar við vaksandi havsúrgan og minkandi íslagi tað mest átrokandi málið. Minkandi íslag gevur møguleikar fyri meiri skipaferðslu og ger havtilfeingið atkomandi til víðfevnda gagnnýtslu. Í Eystarasalti er ovtaðing alsamt ein stórur trupulleiki. Í øllum norðurlendskum høvum er tørvur á at arbeiða fyri burðardyggum fiskiskapi, millum annað so at tað slepst undan ovfisking og skaðiligari ávirkan á vistskipanir í havinum. Málið er at hava vistskipanir í javnvág og at minka sum mest um útlátið av slíkum, sum kann hava óhepna ávirkan á ta natúrligu støðuna hjá høvunum.

Til at kunna loysa nógvar av avbjóðingunum krevst samstarv tvørtur um geirar, tí loysnirnar liggja ofta undir ræðinum hjá øðrum samfelagsgeirum. Tað krevur vistskipanargrundaða havfyrisiting at umsita og menna ein burðardyggan bláan búskap.

Norðurlond taka lut í samstarvi í teimum økisbundnu havumhvørvissáttmálunum (HELCOM og OSPAR) og í ST umframt samstarvinum, sum fer fram í PAME-arbeiðsbólkinum undir Arktiska ráðnum og í ES, til dømis við strategiini hjá ES fyri økið kring Eystarasalt. Norðurlendskt samstarv kann geva sítt íkast við at útvega eitt nú IMO vitanargrundarlag um rusk, dálking og óljóð frá skipum. Norðurlendskt samstarv hevur týdning fyri at styðja økissamstarvið og tað altjoða samstarvið, millum annað við vitan

um mannagongdir og umhvørvisárin. NEFCO hevur týdning fyri at styðja arbeiðið at skerja útlátið í Eystarasalti.

## 6.1 Havið og havtilfeingið

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at virka fyri vernd av havinum og burðardyggari nýtslu av havtilfeinginum til frama fyri burðardygga menning í samsvari við burðardygdarmálini hjá ST
- at virka fyri nýggjum, nýskapandi loysnum, sum kunnu endurreisa vistskipanir í havinum og fram við strondunum

Havið við tess lívfrøðiliga margfeldi og vistskipanartænastum er eitt týdningarmikið tilfeingi, sum styðjar upp undir matvørutrygd, arbeiðsskapan og búskaparliga menning. Havráðstevnan hjá ST í 2017 setti havviðurskiftir og burðardygdarmálið fyri varðveitslu og burðardyggari nýtslu av havinum og havtilfeinginum (SDG 14) í miðdepilin. At hetta málið alsamt verður framt, ger eisini sítt til, at framstig verða gjørd viðvíkjandi øðrum málum í Agenda 2030. Tørvur er á at eyðmerkja, byrgja fyri og minka um alt slag av dálking í havinum, burðardygt at umsita, verja og umvæla vistskipanir í havinum og fram við strondunum og at skunda undir, at regluverk verða sett í verk, hildin og fevnd av munagóðum eftirliti á tjóðar-, økis- og altjóðastigi.

Altjóðarættur, sum hann verður orðaður í UNCLOS, er tað yvirskipaða altjóða regluverkið fyri alt virksemi í og á havinum. Sjálvboðin lyftir og ymsir ST-felagsskapir og aðrar altjóða havráðstevnur skulu fremjast og alsamt takast upp aftur, og í tí sambandi er tørvur á norðurlendskum samstarvi. Ein vistskipanargrundað og samfeld vatn- og havfyrisiting og styrkt havsamstarv á økisstigi eru somuleiðis avgerandi.

## 6.2 Dálkandi útlát og rusk í havinum og fram við strondunum

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at herða átøkini móti streyminum av ruski, eisini plasti og mikroplasti, sum fer í havið og inn at strondunum
- at samstarva um at skerja útlátið av umhvørviseitri í havið
- at halda fram at minka um ovtaðingina

Meginparturin av dálkingini og ruskinum í havinum stavar frá keldum á landi. Sokallað Source-to-Sea-hugsan, t.e. kelda til hav-hugsan, er avgerandi fyri at kunna skilja og basa avleiðingunum av dálking og ruski í havinum. Arbeiðið við tryggari handfaring av evnindum og burturkasti er avgerandi. Arbeiðið við burðardyggum býum og burðardyggari bygging er eisini týdningarmikið. Á altjóðastigi er tørvur á at fremja verandi amboð, men eisini at menna eitt altjóða rammuverk fyri vandamikil evnindir.

Tað er avgerandi at virka fyri at fremja tilgongdina hjá UNEP at meta um ymisk hugsandi stig til betur at kunna basa ruski og mikroplasti í havinum og at fremja eftirlitið við Global Program of Action for Land Based Pollution to the Ocean (GPA) hjá UNEP.

Norðurlendska plastætlanin viðgjørdi plastdálking í havinum. Arbeiðið eigur at halda fram at økja um vitanina og betra um stýriamboðini til at minka um trýstið. Tað er umráðandi, at virkisætlanirnar hjá OSPAR og HELCOM fyri ruski í havinum verða framdar samskipað, og at Norðurlond geva sítt virkna íkast til ES-arbeiðið at minka um umhvørvisárin av plasti.

Umhvørviseitur í høvunum breiðist á ymsan hátt og hópast upp í havinum. Arbeiðið at kortleggja nýggjar vandar, keldur og útbreiðsluhættir skal halda fram og somuleiðis arbeiðið at steðga útláti av umhvørviseitri. Keypmannahavnaravtalan millum Norðurlond um samstarv um at basa havdálking av olju og øðrum vandamiklum evnum er framvegis viðkomandi.

Í Eystarasalti er ovtaðingin ein týdningarmikil trupulleiki, sum má loysast. Hesi málini verða tikin upp í atgerðaætlanini BSAP hjá HELCOM og í ES-rammufyriskipanini um vatn umframt í havumhvørvisfyriskipanini. Strategiin hjá ES fyri Eystarasaltsøkið kann menna vitanar- og atgerðasamstarv tvørtur um geirar og á økisstigi.

## 6.3 Vistskipanargrundað havfyrisiting og vernd av havøkjum

**Raðfestingar hetta skeiðið**

- at virka fyri umboðandi, vistfrøðiliga samanhangandi og væl umsitnum netverkum av vardum havøkjum fyri at røkka samtyktum altjóða málum
- at styðja vistskipanargrundaða havplanlegging og fyrisiting av havtilfeingi, geirasameining íroknað, og virka fyri at menna burðardyggan bláan búskap
- at virka fyri eini bindandi avtalu undir ST-havrættarsáttmálanum um vernd av lívfrøðiligum margfeldi uttan fyri tjóðlógsøgn (BBNJ-tilgongdin)
- virka fyri at menna og luta vitan um norðurlendskar havvistskipanir

Skal burðardygdarmálið fyri høvini røkkast, er tørvur á at verja og sita burðardygt fyri tí lívfrøðiliga margfeldinum í havinum og strandøkjunum í longdini. Hinvegin eru vernd, planlegging og burðardygg nýtsla av havinum ein fyritreyt fyri at menna ein burðardyggan bláan búskap. Nógvir partar eiga lut í havfyrisitingini á økisstigi og altjóðastigi, og tørvur er á betri stýring og meiri samstarvi millum geirar og millum ymiss stig. Tað er umráðandi at fáa í lag eina fremjingarætlan til havrættarsáttmálan UNCLOS fyri vernd av lívfrøðiligum margfeldi í økjum uttan fyri tjóðlógsøgn.

Eitt týdningarmikið amboð til at verja lívfrøðiligt margfeldi í høvunum er at knýta umboðandi, vistfrøðiliga samanhangandi og væl umisitin netverk av vardum havøkjum.

Hetta er eisini eitt av Aichi-málunum. Hetta eigur at fara fram í samsvari við altjóða skyldur, vitanarmenning og *best practice* íroknað. Tað er umráðandi, at hesi netverkini virkið verða løgd til rættis og lagað við fyriliti fyri veðurlagsbroytingunum. Eitt annað avgerandi amboð er vistskipanargrundað havplanlegging. Við vistskipanargrundaðari havplanlegging verða fyrilit vigað viðvíkjandi, hvussu vaksandi mannaávirkan og aðrir tættir, sum ávirka strand- og havøkini (útlát, skipaferðsla, fiskiskapur og orka), skulu handfarast, fyri at tað samstundis skal kunna bera til at verja og varðveita lívfrøðiligt margfeldi og vistskipanartænastur. Havplanleggingin kann gera sítt til at lýsa, hvussu ymsar loysnir eru atvold til alt størri umhvørvisávirkan. Tað er tann samanlagda heildarávirkanin, sum er avgerandi fyri, hvussu stórar avleiðingarnar av havnýtsluni verða fyri umhvørvið. Tí eru planlegging tvørtur um geirar og geirasameining týdningarmikil.

## 6.4 Hav og veðurlag

**Raðfestingar hetta skeiðið:**

- at varpa ljós á sambandið millum veðurlagsbroytingar og havumhvørvið við tí fyri eyga at taka veðurlagsbroytingar og havsúrgan við í havfyrisitingina
- at arbeiða fyri, at gáað verður um sambandið millum hav og veðurlag í sambandi við veðurlagssáttmálan

Útlátið av vakstrarhúsgøssum ávirkar veðurlagið, hitar og súrgar havið, elvir til ilttrot í havinum og kann elva til broytingar í havstreymum. Veðurlagsbroytingarnar hava við sær, at sjóvarmálin hækkar, og at vistkipanir og samfeløg fram við strondunum gerast meira viðkvom, umframt at møguleikarnir at varðveita siðbundnar vinnur versna. Tað hevur avgerandi týdning fyri tað lívfrøðiliga margfeldið í havinum og strandøkjunum, at veðurlagsbroytingarnar verða tálmaðar og vistskipanir umvældar og vardar. Lívfrøðiligt margfeldi hevur avgerandi týdning fyri váðaminkan og tillaging. Vistkipanir fram við strondunum kunnu goyma sera nógv kolevni, samstundis sum tær kunnu leka koltvísúrni, um teirra vistskipanarfunktiónir versna ella verða órógvaðar. Í Norðurlondum økja veðurlagsbroytingarnar um máanina í strandøkjunum.

Norðurlond kunnu í felag reisa málini á altjóða pallum og geva sítt íkast við síni vitan. Mál viðvíkjandi mótstøðuførinum hjá havinum og veðurlagstillaging verða eisini tikin við í alt fleiri altjóða sáttmálar og tilgongdir, t.d. í sambandi við CBD og UNEA. Í sambandi við ST-veðurlagssáttmálan er tørvur á at leggja dent á sambandið millum hav og veðurlag og týdningin av burðardyggari vernd og fyrisiting av vistskipanum í høvunum og fram við strondunum fyri at varðveita mótstøðuførið í høvunum. Átakið *Ocean Pathway* og yvirlýsingin *Because of the Ocean* miða eftir at greiða leiklutin hjá havinum í veðurlagsarbeiðinum undir veðurlagssáttmálanum, eisini í veðurlagsíkøstunum hjá limalondunum. Framhaldandi virkin luttøka í Arktiska ráðnum er týdningarmikil, tá ið ræður um at menna havvernd og fyrisiting.

# 7. Fremjing

### *Ráðharraráð*

Tað er ráðharraráðið fyri umhvørvi og veðurlag (MR-MK), sum er samansett av norðurlendsku umhvørvis- og veðurlagsráðharrunum úr teimum fimm londunum Danmark, Finnlandi, Íslandi, Norra og Svøríki, sum stendur á odda fyri umhvørvis- og veðurlagssamstarvinum hjá norðurlendsku stjórnunum. Harumframt tekur eitt umboð úr ávikavist Føroyum, Grønlandi og Álandi lut. Ráðharraráðið hevur ta politisku høvuðsábyrgdina av norðurlendska samstarvinum í umhvørvis- og veðurlagsgeiranum.

### *Embætismannanevnd, starvsnevnd og skrivstova*

Undir ráðharraráðnum er embætismannanevndin fyri umhvørvi og veðurlag (ÄK-MK), sum er samansett av embætisfólkum úr londunum og einum umboð úr ávikavist Føroyum, Grønlandi og Álandi. ÄK-MK hevur ábyrgdina av at fremja samstarvsætlanina. Ein starvsnevnd (AU) er embætismannanevndini til hjálpar. Skrivstovan hjá Norðurlendska ráðharraráðnum (NMRS) samskipar samstarvið við formanslandið og ger sítt til at fremja samstarvsætlanina.

### *Arbeiðsbólkar*

Samstarvsætlanin verður í høvuðsheitum framd í arbeiðsbólkum á serfrøðistigi.

Teir føstu arbeiðsbólkarnir hetta skeiðið eru:

- Norðurlendski arbeiðsbólkurin fyri ringbúskap (NCE)
- Norðurlendski arbeiðsbólkurin fyri veðurlag og luft (NKL)
- Norðurlendski arbeiðsbólkurin fyri evnindir, umhvørvi og heilsu (NKE)
- Norðurlendski arbeiðsbólkurin fyri lívfrøðiligt margfeldi (NBM)
- Norðurlendski arbeiðsbólkurin fyri hav og strond (NHK)
- Norðurlendski arbeiðsbólkurin fyri umhvørvi og búskap (NME) (saman við fíggjargeiranum)




ÄK-MK ásetur heimildirnar hjá arbeiðsbólkunum. Arbeiðsbólkarnir fáa hvørt ár eina fíggjarætlan fyri sítt virksemi og skulu eina ferð um árið lata ÄK-MK eina frágreiðing um sítt virksemi. Uppgávan hjá arbeiðsbólkunum er at mæla til, stuðla, og fremja ítøkiligar verkætlanir og átøk innan fyri tey ymsu ábyrgdarøkini. Verkætlanirnar skulu fremja norðurlendskt gagn og meirvirði.

Arbeiðsbólkarnir skulu samstarva um at gagnnýta samvirkan, lofta tvørgangandi málum og skapa betri fyrisiting, til dømis við at samstarva í bólkum. Bráðfeingisbólkar kunnu verða settir undir ætlanarskeiðnum. Í sambandi við eftirmetingina miðskeiðis í skeiðnum skal ÄK-MK meta um, um skipanin av arbeiðsbólkunum skal endurskoðast. Metir arbeiðsbólkurin, at tørvur er á undirbólkum, kann ÄK-MK taka avgerð um at skipa slíkar. Broytingar í fíggjarætlanini kunnu hava ávirkan á, hvussu samstarvsætlanin verður framd.

### *Planlegging, uppafturtøka og eftirmeting*

Fylgjast skal við, hvussu gongst at fremja málini og raðfestingarnar í hesi ætlanini. Arbeiðsbólkarnir skulu í árligum arbeiðsætlanum og frágreiðingum lýsa, hvussu teir arbeiða við teimum ymsu málunum og raðfestingunum.

Miðskeiðis í ætlanarskeiðnum skal ein heildareftirmeting gerast av samstarvsætlanini.

### *Samskifti og samstarv*

Gott, munadygt og tvívegis samskifti er avgerandi fyri framgongd. At røkka einum munadyggum umhvørvis- og veðurlagspolitikki krevur upplýst val hjá ymsum pørtum. Nýggj vitan má fáast til vega og miðlast og góð fyridømir breiðast út. Geirarnir skulu framhaldandi gera sítt til at økja um vitanina og alsamt virka fyri at betra um samskiftið. Strategiskt samskiftisarbeiði eigur at seyra ígjøgnum virksemið, og ymsar nýggjar samskiftisrásir eiga at verða brúktar til at tryggja góða útbreiðslu.

Kunning um umhvørvisárin av ymsum politikkum eigur at verða breidd út millum geirarnar, og møguleikarnir at samtykkja atgerðir og fremja nýskapandi tøkni- og skipanarloysnir eiga at verða tiknir fram. Til at røkka munadyggum loysnum til frama fyri burðardygga menning krevst, at samskiftið millum lond og landabólkar verður ment.

Tað er ikki bara umhvørvis- og veðurlagsgeirin, sum hevur ábyrgdina av at loysa avbjóðingarnar á umhvørvis- og veðurlagsøkinum í dag. Fleiri ymsir geirar og politikkøkir mugu taka málini upp, og tað krevur gott samstarv tvørtur um geirar at fremja broytingar og umlegging. Tað er avgerandi, at umhvørvis- og veðurlagsmál verða tikin við í geiraarbeiðið. Til hetta krevst samskifti millum geirarnar.

Tað er somuleiðis umráðandi at miða eftir samstarvi við vinnulívið, tað borgarliga samfelagið, vísindaumhvørvið og aðrar viðkomandi áhugapartar, sum ætlanin verður framd.

# Óheft samstarvsátøk (faktaboks við leinkjum)

### *Svanurin*

Svanurin er tann almenna umhvørvismerkingin í Norðurlondum. Norðurlendsku stjórnirnar stovnaðu merkið í 1989, og talan er um eitt óheft umhvørvismerki innan fyri ábyrgdarøkið hjá norðurlendsku umhvørvis- og veðurlagsráðharrunum. Norðurlendska ráðharraráðið letur Svaninum eitt árligt íkast.

Endamálið er at hava eina sjálvbodna felagsnorðurlendska umhvørvismerking, sum ger sítt til at minka um trýstið, sum gerandisnýtslan leggur á umhvørvið. Svanmerkið ber í sær, at lagt verður upp fyri umhvørvisávirkan frá vørum og tænastum alla lívsringrásina frá rávøru til burturkast. Strong veðurlags- og umhvørviskrøv verða sett, men eisini funktións- og dygdarkrøv. Norðurlendska umhvørvismerkingarnevndin (NMN) samskipar arbeiðið.

### *NEFCO*

NEFCO (Nordic Environment Finance Corporation) er ein altjóða fíggingarstovnur, sum Norðurlond eiga. NEFCO fíggjar verkætlanir við denti á Eysturevropa. Endamálið er at røkka umhvørvisbatum, sum gagna Norðurlondum. Fyri kortum varð nýggj strategi samtykt fyri NEFCO, sum ásetur, at stovnurin skal arbeiða við fýra høvuðsmálum: grønum vøkstri, veðurlagi, Eystarasalti og Arktis og Barentshavinum. Hvørt land velur eitt umboð í nevndina, sum hevur ábyrgdina av virkseminum. Norðurlendsku umhvørvisráðharrarnir kunnu eftir tørvi taka mál upp viðvíkjandi skipanini av stovninum.

Í norðurlendska samstarvinum eru harumframt tveir aðrir fíggingarstovnar. Norðurlendski menningargrunnurin (NDF) undir uttanríkisráðnum arbeiðir við at lætta um veðurlagsíløgur í láginntøkulondum, og Norðurlendski íløgubankin (NIB) undir fíggjarmálaráðnum fíggjar verkætlanir, sum betra um kappingarføri og umhvørvi.

### *Umhvørvisvirðislønin hjá Norðurlandaráðnum*

Umhvørvisvirðislønin verður á hvørjum ári latin einum norðurlendskum felagsskapi, vinnufyritøku ella persóni, sum á fyrimyndarligan hátt hevur tikið virðingina fyri umhvørvinum við í sítt virksemi ella gerning, ella sum á annan hátt hevur tikið heilt serlig tøk til frama fyri umhvørvið. Umhvørvis- og veðurlagsgeirin fíggja umhvørvisvirðislønina og hava fyrisitingina um hendi.

# Styttingar og hugtøk:

- ACAP Arctic Contaminants Action Programme
- AMAP Arctic Monitoring and Assessment Program
- BAT Best Available Technology
- BBNJ A potential legally binding instrument under UNCLOS on the conservation and sustainable use of marine Biological diversity of areas Beyond National Jurisdiction
- BSAP Baltic Sea Action Plan (under HELCOM)
- CAFF Conservation of Arctic Flora and Fauna
- CBD Convention on Biological Diversity
- CCAC Climate and Clean air Coalition
- CITES Convention on International Trade in Endangered Species of wild flora and fauna
- CLRTAP Convention on Long-Range Transboundary Air Pollution
- CMR Substances classified as Carcinogenic, Mutagenic or Reprotoxic
- GHS Globally Harmonized System for classification and labeling of chemicals
- HELCOM The Helsinki Commision
- HFC Hydrofluorcarbon
- ICAO International Civil Aviation Organization
- IMO International Maritime Organization
- IPBES Intergovernmental Science-Policy Platform on Biodiversity and Ecosystem Services
- IPCC Intergovernmental Panel on Climate Change
- MRV Measurement, Reporting and Verification of greenhouse gases
- NDF Nordiska utvecklingsfonden
- NDC Nationally determined contributions
- NEFCO Nordiska miljöfinansieringsbolaget
- NIB Nordiska Investeringsbanken
- NMN Nordiska miljömärkningsnämnden
- NOx Oxides of Nitrogen
- OECD Organization for Economic Co-operation and Development
- OEF Organization Environmental Footprint
- OSPAR Convention on the protection of the North East Atlantic

- PAME Protection of the Arctic Marine Environment
- PBT Persistent, Bioaccumulative, and Toxic substances
- PCB PolyChlorinated Biphenyl
- PEF Product Environmental Footprint
- RAMSAR Convention on Wetlands
- REACH Registration, Evaluation, Authorization, and restriction of Chemicals
- SDG Sustainable Development Goals within Agenda 2030
- SLCP Short-Lived Climate Pollutants
- UNCLOS United Nation Convention on the Law of the Sea
- UNEA UN Environment Assembly (see UNEP)
- UNECE United Nation Economic Commission for Europe
- UNFCCC United Nation Framework Convention on Climate Change
- UNEP United Nations Environment Program
- UNESCO United Nations Educational, Scientific, and Cultural organization
- VOC Volatile Organic Compounds